# svomið til Íslands n var 80 ár



Mynd: Jens Kristian Vang

vera við í eini kappsvimjing. Hann játtaði, men mátti fyrst venja eitt sindur í Hoydalshyli.

Ólavsøkudagur kom. Um morgunin hevði regnað illa, tí var Havnará stór og gruggut. Hildið varð, at hetta mundi ikki fara at bila kortini. Svimjast skuldi frá Müllarbrúgv yvir á Kongabrúnna og aftur, umleið 100 metrar. Johan skuldi kappast við Jóhannis Toftum. Tað gekk ikki so væl, tí Johan tapti. Men hann svam teinin enn einaferð og fyri hetta fekk hann eitt hamrað silvurpennaskaft við haldara, sum hann enn eigur. Tað var kalt at svimja 200 metrar á sjónum. Av tí, at áin var so stór mátti leggjast upp fyri áarstreyminum fyri at koma á mál.

## Sluppu ikki at svimja fyri neytum

Henda kappsvimjing á Eystaruvág helt uppat. Tann fyrsti svimjihylurin var bygdur í Gundadali í 1932. Hann var til støddar sum ein 25 metra hylur, men ein triðing av honum var ikki svimjandi í, tí tað var ov grunt.

Men her vóru eisini aðrir hentleikar, nevniliga eitt hús at skifta í. Víst vóru bert fimm skiftirúm, men hetta var roknað fyri at vera óført. Hesin hylur lá har, sum tennisvøllurin nú er.

Eitt annað er so eisini broytt nú í mun til tá. Hetta var úti í haganum. Tí var ikki altíð so lætt hjá børnunum at koma hagar vegna neytini, sum gingu leys!

Her var kappsvimjing hildin á ólavsøku, og Johan var við fleiri ferðir, eisini í 1932. Hóast umstøðurnar ikki vóru so góðar, so legði hesin svimjihylur lunnar undir svimjing í Havn.

Johan fór til skips í 1937, og var tí burtur frá svimjing i mong ár. Hertil kom, at undir krígnum kom bretska hermegin at brúka Gundadal til venjingar og tílíkt.

Seinni, í 1959, varð so svimjihylur bygdir, har Badmintonhøllin er nú, og seinni, í 1982 aftur tann núverandi hylurin.

## Fekk starv í svimjihylinum

Seinasta ferðin hjá Johan til skips var við Nornagesti við Thorvald Andreassen sum skipara. Tá ið hann eina ferð er heima kemur Ivan Carlsen, sum var leiðari í svimjihylinum og biðjur hann koma at arbeiða har. Ein treyt fyri eitt slíkt starv var at duga at svimja, men her var eingin trupulleiki, og Johan byrjaði 28. januar 1963. Hetta var tá ið svimjihylurin ikki var innilokaður og bert var opin á sumri. Men um veturin fekk Johan so umvælingararbeiði at gera.

Í 1975 varð hann settur sum fastur maskinmaður við svimjihylin. Tað varð sagt um hann, tá ið hann hevði 25 ára starvsdag, at hann var ein slítari, treytur og raskur, sum tað sømir seg einum Hornamanni. Eina ferð baksaðust teir við eitt brek í gamla hylinum og einki vildi bera til. Maðurin, sum Johan arbeiddi saman við, hevði hug at gevast og fáa hendur á einum maskinsakkønum uttani frá. Hetta hevði Johan ongan hug til: "Geva upp! Tú er óður í høvdinum. Hvat um vit vóru staddir 100 fjórðingar úr Kappanum?" Tað er óneyðugt at siga, at teir fingu maskinaríið at rigga.



*Hetta er virðislønin sum Johan fekk, tá hann við svimjikappingina á 1930 svam ásetta teinin tvær ferðir. Hetta er eitt pennaskaft við haldara. Undir lokinum eru tvey "blekkhús"*

## Svimjingin til Ísland

Nú koma vit aftur til yvirskrivtina til hesa grein. Eftir at Johan var blivin pensjoneraður sum 70 ára gamal, fekk hann blóðpropp í beinið. Hann var so ringur, at hann fekk ikki gingið og sat í rullistóli. Afturat tí hevði hann nógva pínu. Tað vóru nógvir læknar, sum vóru um hann, men tað gjørdi tað sama. Eina ferð sigur Johan við Essa Arge, at nú fór hann niður at royna at fáa gjørt nakað við hetta. Nei, segði Essa, far tú og royn Elina Mørkøre. Hann so gjørdi. Elin staðfesti, at tað var bruni í øllum nervunum, og hon fekk hann so til at royna ein nýggjan heilivág. Tríggjar vikur eftir var pínan burtur. Tað ráddi eisini um at røra seg, og her er einki betri enn svimjing.

Í ár 2000, tá ið hann var 80 ára gamal helt Johan, at tað kundi verið áhugavert at fáa staðfest,



*Johan Norðfoss nýtir ein tíma í hitarúminum um dagin. Har frættist alt, sum er vert at vita*

*Mynd: Jens Kristian Vang*